# Gott úrslit hjá Trygd

**TRYGGING** Ársúrslitið gjørdist 20,4 millónir krónur fyri skatt, og tað er nakað lakari enn 2009, sum við 29,2 milliónum krónum í avlopi fyri skatt var besta árið nakrantíð hjá tryggingarfelagnum

Leo Poulsen

Tryggingarfelagið Trygd boðaði í gjár frá ársúrslitinum fyri 2010. Árið í fjør var sum heild lakari enn metárið 2009, tá felagið hevði 23,9 milliónir krónur í avlopi eftir skatt. Talið fyri 2010 er 16,8 milliónir.

Trygd sigur, at tryggingartekniska úrslitið var 17,2 milliónir krónur í 2010 í mun til 25,4 milliónir krónur fyri 2009.

Leiðalsn er nøgd við úrslitið, tó at tað ikki var eins gott og metárið 2009.

Trygd sigur, at skaðagongdin hevur verið nøktandi. Talið av skaðum hevur verið mest sum á sama støði sum árið fyri, men skaðagjøldini eru hækkað úr 42,4 milliónum í 2009 upp í 47,2 milliónir krónur í 2010. Økingin stavar millum annað frá størri endurgjaldi fyri persónsskaðar, eins og nakað fleiri brunaskaðar hava verið.

Samlaðu tryggingargjøldini í 2010 vóru í alt 86,2 milliónir krónur, og tað er ein minking í mun til 2009, tá tryggingargjøldini vóru 91,9 milliónir krónur. Hendan broytingin stavar frá lægri inntøkum frá biltryggingum og einstøkum vinnutryggingum.

»Búskaparstøðan í samfelagnum hevur havt við sær, at tørvurin á tryggingardekningum hevur verið fallandi, og samstundis er kappingin herd um bæði privatar og vinnuligar kundar. Sølan av privatum húsum og bilum er framvegis lág, hóast framgongd er at merkja«, sigur Trygd.

### Vinningsbýti

Hóast 2010 sostatt gjørdist verri enn 2009, so er leiðslan tó nøgd við gongdina.

- 2010 gjørdist eitt gott ár fyri Trygd. Eitt heppi samanfall av góðum veðrið og fáum skaðum gjørdi sítt til, at árið hepnaðist væl og tað fegnast vit um. Tað er umráðandi hjá Trygd at varðveita eitt kappingarført tryggingarvirksemi, soleiðis at føroysku tryggingartakararnir altíð kunnu fáa eina dygdargóða tænastu til kappingarførar prísir. Tí er umráðandi at halda rakstrarúrtreiðslurnar av felagnum á so lágum støði sum møguligt, og samstundis veita góða ráðgeving, og skjóta og dygdargóða skaðatænastu, sigur Jean Djurhuus, stjóri í Trygd.

Hann heldur, at tað er ein orsøk til, at tryggingarmarknaðurin hevur verið ávirkaður.

- Búskapargongdin í samfelagnum hevur gjørt sítt til, at tryggingarmarknaðurin hevur verið nakað stirvin. Tá ið tað ikki er so nógv virksemi við keyp og sølu av ognum, ið skulu tryggjast, er avbjóðingin størri at vaksa, men vit eru hóast alt nøgd við, at felagið alsamt styrkir um sína marknaðarstøðu", sigur Jean Djurhuus.

Eginognin hjá Trygd var við ársenda 2010 100,2 milliónir krónur.

Aðalfundurin samtykti at útgjalda 15 milliónir krónur í vinningsbýti, sigur Trygd.




*Hóast lakari ársúrslit enn metárið 2009, er Jean Djurhuus, stjóri í Trygd, nøgdur við gongdina*

# Blandar seg ikki

**SEMING** Jóhan Dahl hevur ongar viðmerkingar til, um hann fer at leggja lóg fyri Tingið at Strandfaraskipini verða undantikin einum møguligum verkfalli

Leo Poulsen

Sum kunnugt slitnaðu samráðingarnar millum lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum og Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið. Hetta merkir, at semingsmenn nú eru komnir upp í samráðingarnar.

Tað eru teir báðir Jógvan Amonsson og Alfred Petersen, sum skulu royna at fáa semju partanna millum.

Jógvan Amonsson sigur, at teir hava boðað pørtunum frá, at teir eru so upptiknir í løtuni, at tað verður ikki fyrstu dagarnar, at teir taka upp semingina.

- Hetta hava partarnir góðtikið, og vit hava av góðum grundum ikki havt stundir at sett okkum inn í smálutirnar í samráðingunum og duga tí heldur ikki at siga, hvat knútapunktini eru, sigur Jógvan Amonsson.

Tá samráðingarnar vóru millum lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum og Starvsmannafelagið ljóðaði, at Jóhan Dahl var til reiðar at leggja uppskot fyri Tingið um at undantaka Strandfaraskipini einum verkfalli, men landsstýrismaðurin sigur, at hann als ongar viðmerkingar hevur til støðuna.

- Vit hava havt samband við fakfeløgini, og tey tóktust positivt innstillað at finna eina loysn við Strandfaraskipunum, og tí hevði tað verið skeivt av mær at melda nakað út, nú feløgini samráðast um ein nýggjan sáttmála, sigur Jóhan Dahl.



*Jóhan Dahl vil ikki gera viðmerkingar til Strandfaraskipini og verkfall, men vil lata partarnar fáa frið til at finna fram til eina semju*